# nmi um at broyta alla
# ina hjá fiskimonnum



- Tað eru í fyrsta lagi tríggjar fyritreytir, sum avgera inntøkuna hjá fiskimonnum – sáttmálin, veiða og prísir og inntøkutrygdin, segði Óli Jacobsen, felagsformaður
Mynd: Jens Kr. Vang

hvussu stóra ávirkan, vit kunnu hava á sjálva veiðina. Tó hava vit saman við hinum feløgunum á økinum havt ein leiklut við ásetan av fiskidøgum.

Óli segði, at FF eisini hevur havt ein rættiliga stóran leiklut í karmunum fyri prísáseting á tí botnfiski, sum verður landaður í Føroyum.

- Vit høvdu fram til endan av áttatiárunum ein "planøkonomi" fyri flakavinnuna, sum gjørdist ein búskaparlig vanlukka. Vit vóru millum teir fyrstu sum fóru at berjast fyri marknaðarbúskapi og kapping um fiskin, sum hevur gjørt prísirnar so høgar, sum teir hóast alt hava verið - og tað uttan studning.

Hann vísti á, at FF seinastu árini eisini hevur átt sín part í umlegging av fiskamarknaðinum við nýggjari uppboðssølu, sum er enn eitt stig á leiðini í hesi kapping og málinum um at fáa "rættar" prísir fyri fiskin.

## Inntøkutrygd

At enda í hesum sambandi nam felagsformaðurin eisini við inntøkutrygdina, sum er av avgerandi týdningi fyri tryggleikan hjá fiskimonnum.

- Her eru hendir stórir batar, síðan vit fyrstu ferð fingu hesa skipan, men seinastu árini hevur fremsta uppgávan verið at halda tørn.

Óli vísti á, at felagið í hesum sambandi enntá hevur verið í hornatøkum við donsku stjórnina, sum helt, at her varð tikið ov rívan til.

- Danska uppíleggingin varð at enda slept, og soleiðis var hetta eisini ein sigur fyri føroyskt sjálvræði.

Felagsformaðurin vísti eisini á onnur viðurskifti, sum eru rættiliga avgerandi fyri umstøður fiskimanna, og eitt av hesum málum er tryggingarmálið. Hann helt fyri, at her er felagið komið væl áleiðis við at tryggja fiskimenn, tá ið illa vil til.

Batar eru hendir, men hetta eru fyrst og fremst batar, sum feløgini sjálvi hava skipað fyri sum samlagstrygging og trygging fyri hættisliga sjúku.

Óli Jacobsen helt hinvegin ikki, at nógv er hent á almenna økinum í tryggingarmálum.

- Ein nýggj vanlukkutryggingarlóg hevur verið á veg í mong ár, men higartil er ikki nógv komið burtur úr hesum, segði felagsformaðurin.



- Eftir norsku fastlønarskipanini verður eitt nú avroknað yvir eitt hálvt ár í senn, og daginntøkan verður tann sama fyri allar túrar. Tað tykist sum hetta riggar - og at fiskimonnum dáma tað. Kanska er hetta leiðin fram, segði Óli Jacobsen á landsfundinum
Mynd: Jens Kr. Vang